

Tveir av fyrilestrarhaldarunum á Atlantic Fair saman við borgarstjóranum Jógvan Skorheim, Tróndur Djurhuus, rithøvduni og Martin Sonny Fredriksen, sum fer at halda fyrilestur kl. 12 í dag. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Frálandsvinna í Føroyum – útlit og menningarmøguleikar

**Jan Müller**

13.05.2015 - 09:19

Oljan.fo

Hetta er heitið á tí fyrsta fyrilestrinum á Atlantic Fair stevnuni í Klaksvík í dag. Milllum fyrilestrarhaldararnar í dag eru Jens Meinhard Rasmussen, stjóri á Skansi Offshore og Mouritz Mohr, stjóri á MEST.

Fyrilestrarrøðin á Atlantic Fair stevnuni í Klaksvík heldur fram í dag við fleiri áhugaverdum fyrlestrum um føroyska vinnu. Jens Meinhard Rasmussen, stjóri í Skansi Offshore, leggur fyri kl. 11 við framløgu hann kallar: “Frálandsvinna í Føroyum – útlit og

menningarmøguleikar”. Klokkan 12 fer Martin Sonny Fredriksen, nevdarlimur í Antares at røða um áhugafelagið Antares og teirra gott og væl 620 limir, sum arbeiða í útlandinum. Klokkan 13 leggur Mouritz Mohr, stjóri í MEST,fyri við fyrilestri hann nevnir: “Vinnan í Føroyum er kappingarfør.” Klokkar 14 fer forkvinnan í Havna- og vinnunevndini í Klaksvík, Óluva Klettskarð og tosa um Klaksvík og vinnumøguleikar. Klokkan 15 fara Maria Húsgarð, Granskingarráðið, Brynhild Absalonsen, Vinnuframi og Jákup Mørkøre, Fiskivinnuroyndir at tosa um stuðulsmøguleikar til menning og nýskapan í Horizon 2020. Seinasti fyrilesturin í dag verður kl. 16, tá Sunnvard Joensen frá MEST fer at tosa um bíligari rakstur og leingjan av livitíð – Enniberg”. Ein fyrilestur verður hósdagin kl. 14. Tá fer Hanus Samró, rithøvundi at tosa um stríðið um fiskimarkið, nú tað eru liðin 60 ár, síðani føroyingar tóku støðu til fiskimarkið.

Ì gjár vóru fleiri fyrilestar á Atlantic Fair, har m.a. Johan Dahl, vinnuráðharri tosaði um maritimu framtíðina, Tróndur Djurhuus, vinnulívsmaður um Klaksvík sum maritimt mekka og Sjúrður Skaale, formaður í Arktiska arbeiðsbólkinum á Fólkatingi tosaði um eitt nú møguleikar í Arktis.